LM-087/2023

Fylgiskjal 14

FFG – Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Løgmálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

lmr@lmr.fo
jakupa@lmr.fo

FFG - Hoyringssvar LMR Dátuverndarlógin 050224.pdf
Tórshavn, tann 6. februar 2024

Hoyringsvar til broytingar í Dátuverndarlógini v.m. – Mál.nr. 23/18810

Víst verður til teldupost tykkara 15. januar 2024 við uppskoti til broytingar í Ll um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógini)

Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG) takkar fyri møguleikan fyri at gera viðmerkingar til ætlaðu broytingina í Dátuverndarlógini. Nevndin hevur gjøgnumgingið uppskotið til broytingar í nevndu dátuverndarlóg og hevur FFG hesar ítøkiligar viðmerkingar og tilmælir til lógaruppskotið:

Avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum eru sum kunnugt fyrisitingarligar avgerðir, ið eru endaligar innan fyrisitingina. So statt hava fyritøkur og stovnar sum skilst ongan kærumyndugleika, har avgerðirnar kunnu roynast, áðrenn tær verða almannakunngjørdar. Einasti møguleiki er at fara til dómstólarnar, ið sum kunnugt ofta vil føra við sær drúgv og kostnaðarmikil mál. Ein lítil fyritøka hevur í flestu førum onki annað val enn at taka fyrisitingarligu avgerðina til eftirtektar.

Avleiðingin av uppskotinum er tískil í veruleikanum, at ein fyritøka ella stovnur kann verða "dømd", uttan at hava vanligu rættindini hjá einum ákærdum, t. d. ein kærumøguleika. Havast skal í huga, at ein møgulig skeiv avgerð, ið verður almannakunngjørd, kann hava serstakliga óhepnar fylgjur fyri einstøku fyritøkuna ella stovnin.

Hjá smærri fyritøkum ella stovnum við fáum starvsfólkum vil ein almannakunnger av navninum hjá fyritøkuni ella stovninum í veruleikanum hava við sær eina almannakunnger av ábyrgdarhavandi persóninum í viðkomandi fyritøku ella stovni.

Í almennu viðmerkingunum verður sum ein grundgeving víst á, at Dátueftirlitið verður javnsett við aðrar føroyskar eftirlitsmyndugleikar og stovnar, so sum Kappingareftirlitið, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann. Vit skulu vísa á, at nevndu myndugleikar ikki eru serliga samanberiligir við Dátueftirlitið, um hugt verður eftir viðskiftafólkunum. Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður viðgera einans mál hjá almennum stovnum, meðan Kappingareftirlitið í einstøkum førum viðgerð fráboðað mál hjá smærri fyritøkum, men annars í høvuðsheitum viðgerð mál hjá størri fyritøkum.

Løgmálaráðið nevnir í almennu viðmerkingunum, at dømir eru um, at stovnar og fyritøkur ganga beinleiðis ímóti boðum frá Dátueftirlitinum. Um tað hava verið slík álvarslig mál um vantandi vilja til at lýða lógina, so kundi ein møgulig loysn verið, at Dátueftirlitið í serligum førum fær heimild til at víkja frá kravinum um navnloysi og ókenniligheit, til dømis um talan er um afturvendandi brot.

Vísandi til gongdina seinastu árini við øktum lógarkrøvum um almannakunnger av upplýsingum, hevði yvirskipað verið ynskiligt við einum aðalorðaskifti um, hvørjar upplýsingar um fyritøkur og stovnar eru høskandi og gagnligir at almannakunngera. Í hesum sambandi eigur eisini at verða hugt eftir, hvussu neyðug atlit verða tikin til rættartrygdina hjá einstøku fyritøkuni og stovninum, áðrenn upplýsingar verða almannakunngjørdir. Eitt slíkt prinsipielt orðaskifti eigur at fara fram, áðrenn hetta uppskotið verður samtykt.

LM-087/2023

Vinarlig heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG)

Olaf Frits Joensen formaður	Fróði Sivertsen næstformaður	Jóhannes Færø peningarøkil	Alvi S. S. Nielsen skrivari